Stynja undir okursprísum

Útreiðslurnar hjá føroyska fiskiflotanum til olju eru meiri enn tvífaldaður uppá minni enn eitt ár og støðan er heilt álvarslig hjá einum stórum parti av føroyska fiskiflotanum. Tí fara reiðarar helst aftur at biðja um studning úr landskassanum

–Tað er blivið heilt galið hjá føroyska fiskiflotanum og nú umhugsa reiðarar aftur at biðja landskassan um studning

Áki Bertholdsen

Tann høgi oljuprísurin er blivin ein álvarsligur trupulleiki hjá føroysku fiskivinnuni. Trupulleikin er so álvarsligur, at reiðararnir nú umhugsa at biðja landskassan um hjálp.

Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum, sigur, at teir eru farnir at viðgerða spurningin um at biðja um hjálp úr landskassanum.

Málið er ikki endaliga viðgjørdur enn, men hann skal nú umrøðast í teimum ymsu skipabólkunum.

Formaðurin í reiðarafelagnum sigur, at útreiðslurnar hjá føroyska fiskiflotanum til olju, er meiri enn tvífaldaður hetta seinasta árið.

– Útreiðslurnar hjá flotanum til olju eru nú blivnar 150 milliónir hægri um árið, enn tær vóru fyri minni enn einum ári síðani og hetta er meiri enn skipini orka at bera.

– Hetta seinasta árið er oljuprísurin hækkaður 150% og tað sigur seg sjálvt, at tað kemur vinnuni í álvarsamar trupulleikar. Hóast tey seinastu árini hava verið góð, ger hendan príshækkingin, at ein stórur partur av yvirskototinum hjá fleiri skipabólkum verður etin upp av eyka útreiðslum til olju, og tað tolir vinnan ikki. Tilsamans brúka føroysk skip um 100.000 kubikkmetrar av olju um árið, so talan er um eina rættiliga umfatandi útreiðslu.

Oljustudning í gildi aftur

Jákup Sólstein sigur, at beinleiðis stuðul úr landskassanum er einasti møguleiki hjá skipunum at fáa hjálp til oljuna, tí oljuprísurin til skipini er frammanundan fullkomiliga reinsaður fyri avgjøld til landskassan og hann er eisini mvg-fríur.

– Tí ber tað ikki til at heita á landskassan um at lækka avgjøld fyri at lætta um hjá skipunum. Tað er heldur ongin loysn at bunkra olju í øðrum londum, tí til skip oljan í Føroyum fult so bílig, sum aðrastaðni.

– Skal nakar møguleiki tí vera at fáa ein lætta, er einasti máti at fáa hjálp frá tí almenna og at fáa stuðul úr landskassanum til olju, sigur Jákup Sólstein.

Við tí fyrivarni, at umsóknin til landsstýrið um stuðul, ikki er liðugt viðgjørd í reiðarafelagnum enn, sigur Jákup Sólstein, at fyribils heldur hann, at einfaldasti mátin er at landsstýrið setir oljustudningin í gildið aftur.

– Skipini fingu oljustudning fyrr, og lættasti mátin er at seta hann í gildið aftur, so at skipini fáa ávísan stuðul úr landskassanum fyri hvønn litur av olju, tey brúka.

– Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu nógva olju, tey ymisku skipini brúka, men serliga rakar tann høgi oljuprísurin trolararnar, eitt nú rækjutrolararnar, djúpvatnstrolararnar og skipini, sum fiska uppsjóvarfisk, serliga meint, tí tey brúka so nógva olju.

– Men ein skipan, har skipini fáa oljustuðul fyri liturin er rættast at seta í verk, tí tá fara tey skipini, sum brúka mest í olju, eisini at fáa mest í studningi, sigur Jákup Sólstein.

Hann veit væl, at stuðulsskipanir eru ímóti politiska rákinum, men hann heldur kortini, at oljustudningur eigur at verða settur í verk.

– Vit eru í eini undantaksstøðu, akkurát sum tá ið oljukreppurnar vóru í sínari tíð og tá fingu skipini oljustudning. Og støðan nú er heilt álvarsom hjá pørtum av flotanum, sigur formaðurin í reiðarafelagnum

Vilja heldur bløða út enn at fáa stuðul úr landskassanum

Stjórin á Havsbrún í Fuglafirði vil ikki hoyra talan um almennan studning, hóast tann høgi oljuprísurin rakar teir sera meint.

Tann høgi oljuprísurin rakar eisini avreiðingarprísin, tí Havsbrún fær ikki latið skipunum so høgan prís, sum virkið annars hevði kunnað latið. Men mesta tapið ber Havsbrún sjálvt, so vinningurin hjá virkinum fer at minka munandi

Áki Bertholdsen

– Vit siga kortnei til almennan studning. Vit skulu heldur bløða út enn at vit vilja hava studning frá tí almenna.

Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún er púra avgjørdur, tá ið vit spyrja hann, um tað almenna eigur at stuðla vinnuni fíggjarliga fyri at byrgja upp fyri teir himmalhøgu oljuprísunum. Havsbrún í Fuglafirði er tað virkið í landinum, sum brúkar nógv mest av olju. Havsbrún brúkar um 8.000 tons av olju um árið.

Í mars mánaða í fjør kostaði liturin góð 60 oyru fyri liturin. Men seinast Havsbrún keypti olju, kostaði liturin 1,50 fyri liturin.

– Sostatt er oljan góð 80 oyru dýrai fyri liturin nú, enn hon var síðsta vár. Tað vil aftur siga, at nú kostar oljan meiri enn tvær ferðir so nógv, sum hon kostaði í mars í fjør.

Ávirkar avreiðingarprísin

Bergur Poulsen sigur, at hetta seinasta árið kemur Havsbrún tilsamans at brúka næstan seks milliónir meiri í olju, enn virkið brúkti undanfarna ár.

– Hetta er sjálvsagt nakað, um ávirkar raksturin sera nógv.

– Partvís førir tað við sær, at vit fáa ikki latið skipunum tann avreiðingarprísin, sum vit annars høvdu kunnað latið. Men tað førir eisini við sær, at vinningurin hjá virkinum minkar munandi, tí tað mesta av meirútreiðslunum tekur virkið sjálvt á seg.

– Men stjórin á Havsbrún sigur, at tað ber heldur ikki til at lækka avreiðingarprísin ov nógv, tí tað er hørð kapping um rávøruna. Og lækkar prísurin ov nógv, hóra skipini ikki undan- og so fær Havsbrún heldur onga rávøru. Vit liva av hvørjum øðrum so talan er um eina javnvág, har hvør má laga seg eftir øðrum.

Kortanei til studning

Vit spurdu eisini stjóran á Havsbrún, um tað kundi hugsast, at teir fóru at ganga somu leið sum reiðararnar og kanska fara at biðja landskassan um studning fyri at byrgja upp fyri tí høga oljuprísinum.

Men Bergur Poulsen er púra avgjørdur tá ið hann svarar.

– Kortanei. Vit vilja hvørki síggja, ella hoyra um almennan studning til nakað sum helst. Vit skulu fyrr bløða út, enn at vit vilja hava almennan studning, tí almennur studningur bara avlagar vinnuna og hann skal burtur.

Bergur Poulsen sigur, at almennur studningur førir bara við sær, at vinnan verður politiskt og tað svansið hava vit havt nóg mikið av. Tað hava vit roynt og tað skulu vit ongantíð út í aftur.

– Almennur studningur byggir onki upp. Vit lótu fiskivinnuni 500 milliónir í studningi um árið, og hvat varð úrslitið??. Alt fór í skeljasor, so lat okkum undir ongum umstøðum taka tann táttin uppaftur.

Stjórin á Havsbrún sigur, at so leingi vit kappast á jøvnum føti við onnur, skulu vit nokk klára okkum.

– Tað er ikki bara í Føroyum at oljan er dýr. Tað er hon eisini alla aðra staðni, so oljuprísurin í Føroyum er ikki kappingaravlagandi, tí her eru ongi avgjøld á oljuni, sigur Bergur Poulsen.

– Og eins og oljuprísurin er hækkaður seinasta árið, man hann eisini fara at lækka aftur, tí hann gongur upp og niður alla tíðina, leggur stjórin á havsbrún afturat.

Rækjuskipini fáa betri sølumøguleikar

Danska stjórnin hevur saman vi› ø›rum londum gjørt eina n‡ggja tollavtalu vi› Kina, sum hevur vi› sær, at tollurin á rækjum fer úr 70 ni›ur í 30 prosent

Stefan í Skorini

Avtalan, sum Danmark hevur gjørt, fevnir eisini um Grønland og Føroyar. Ta› hevur vi› sær, at føroyskir rækjuútflytarar hava betri møguleikar at selja rækjur á heimsmarkna›inum. Hetta letur hur›ar upp, sum á›ur bara hava sta›i› á glopp. Tó eru ikki bara fyrimunir vi› hesi avtaluni.

Rækjuskipini fegnast

Jákup Egholm Hansen, forma›ur í felagnum Rækjuskip, er sjálvandi fegin um avtaluna, tí hetta økir um keypiorkuna av rækjum og økir samstundis um sølumøguleikarnar.

Jákup Egholm Hansen sigur, at Føroyar hava stórar avmarkingar á ES-markna›inum, og tí er ta› ein fyrimunur, at markna›urin veksur.

Sølan av rækjum til Kina er á›ur farin solei›is fram, at rækjurnar eru seldar til Kina uttan toll, men so hava kinesisku keypararnir tiki› sær av at gjalda tollin. Nú tá tollurin minkar munandi, so ver›a møguleikarnir at selja til Kina betra›ir.

Jákup Egholm Hansen sigur, at sølan til Kina hevur veri› í bylgjum. Onkuntí› hevur veri› nógv selt og minni a›rar tí›ir. Avtalan kann hava vi› sær, at tann nøgdin, sum ver›ur seld til Kina, gerst meira stø›ug.

Føroyar kunnu bara útflyta 2000 tons av rækjum til ES-markna›in, á›renn tollur ver›ur lagdur á, og hetta avmarkar menningina í rækjuídna›inum í Føroyum.

- Sum nú er hava vit stórar avmarkingar á ES-markna›inum, og henda n‡ggja avtalan kann økja um møguleikarnar hjá rækjuskipunum at sleppa av vi› rækjurnar fyri ein gó›an prís, sigur Jákup Egholm Hansen.

Ísland hevur ígjøgnum EBS-avtaluna fingi› næstan fría atgongd til ES-markna›in, me›an Føroyar enn hava eitt loft á innflutninginum.

Ein avtala er fingin í lag millum Føroyar og ES um laks, men ein avtala um rækjur liggur enn á láni. Fundur ver›ur væntandi í heyst millum Føroyar og ES um rækjulofti›.

Jákup Egholm Hansen heldur eina av orsøkunum til, at ein avtala er fingin í lag er, at Kina fegi› vil sleppa uppí WTO, heimshandilsfelagsskapin.

Ein av treytunum er, at tollurin á ávísum vørum skal minka. Kinesisku myndugleikarnir hava sí›ani kanna›, hvør tollur ver›ur lagdur á teirra vørur og hava gingi› vi› til at lækka rækjutollin.

Ringt at spáa

Hans Jóhannes á Brúgv, stjóri á Fiskasøluni, heldur ta› ver›a naka› tí›liga at meta um, hvørja ávirkan henda avtala fer at hava, tí hon hevur bara veri› galdandi sí›an 1. september í ár.

Tískil hevur eingin kollvelting veri› enn, men hann metir, at hon kann økja munandi um nøgdina, sum seld ver›ur til Kina. Enn hevur Fiskasølan tó ikki selt naka› til Kina, sí›an avtalan kom í gildi.

Hans Jóhannes á Brúgv sigur, at vanliga hava rækjur bara veri› seldar til Kina um heysti› og um veturin, men nú er møguleiki fyri, at hesin handil kann vera alt ári›.

Ein fyrimunur liggur eisini í, at ein partur av rækjunum, sum annars høvdu veri› sendar á evropeiska markna›in, nú fara eystureftir ísta›in. Hetta kann minka um tr‡sti› á evropeiska markna›in, og prísuin ver›ur stø›ugari. Her ver›ur serliga hugsa› um grønlendsku vei›una.

Kinesarar keypa mest tær smáu rækjurnar, sum tey føroysku skipini fáa heilt fitt av. Hetta økir um sølumøguleikarnar hjá føroysku skipunum, av tí at ein stórur partur av vei›uni er smáar rækjur.

Hans Jóhannes á Brúgv leggur tó dent á, at ta› er sera torført at meta um, hvørjar broytingar fara at standast av n‡ggju avtaluni.

Fiskasølan umbo›ar í løtuni 70 prosent av føroyska útflutninginum av rækjum.

Torførari hjá rækjuvirkinum

Einasta rækjuvirki› í landinum er ta› á Oyri, men virki› fær ongan beinlei›is fyrimun av avtaluni. Øll teirra framlei›sla fer til evropeiska markna›in, harav helvtin til England, men einki fer til Kina.

Hinvegin merkir hetta, at rækjuvirki› fær størri kapping um rávøruna frá kinesiskum keyparum. Útbo›i› á føroyska markna›inum kann tískil minka.

Sofus Poulsen, stjóri á rækjuvirkinum, heldur tó ikki, at talan er um ein beinlei›is vansa, men hann ásannar samstundis, at størri kapping ver›ur um tær størru ídna›arrækjurnar, sum virki› mest keypir frá før≠oyskum bátum.

Rækjuskipini fáa nú betri sølumøguleikar, vi› ta› at tollurin á rækjur til Kina minkar munandi. Rækjuvirki› fær hinvegin størri kapping um rávøruna